# Starvsskipan
fyri
landsstýrismálanevndina

**§ 1.** Landsstýrismálanevndin hevur eftirlit við, at starv landsstýrisins verður útint á lógligan hátt.

**§ 2.** Landsstýrismálanevndin heldur fund regluliga, har limirnir kunnu taka upp ávís mál til umrøðu, sum viðvíkja fyrisiting landsstýrisins í einum rættarligum høpi. Kemur landsstýrismálanevndin í hesum sambandi fram á mál, sum nevndin ynskir at taka til nærri kanningar, biður nevndarskrivarin avvarðandi landsstýrismann um innlit í málið og/ella um at svara ávísum spurningum.
*Stk. 2.* Borgarar landsins kunnu eisini kæra til landsstýrismálanevndina um ólógliga framferð hjá løgmanni ella landsstýrismanni.

**§ 3.** Tá ið kæra er innkomin ella biðið er um innlit ella upplýsingar í einum ávísum máli sbr. § 2, stovnsetir skrivarin eitt mál, og málið verður journaliserað á løgtingsskrivsstovuni. Váttan um móttøku av kæruni verður send kærara.

**§ 4.** Nevndin tekur málið upp á fundi og metir um, hvørt hetta er mál, sum nevndin vil taka upp til viðgerðar.

**§ 5.** Nevndin tekur ikki mál til viðgerðar, tá ið
1) nevndin ikki metir, at rímilig grund er á fyriliggjandi grundarlagi at halda, at brot er framt á lóggávuna,
2) málið viðvíkur einum broti á lóggávu á málsøki, sum ikki er yvirtikið,
3) málið viðvíkur einum broti, sum ikki hvílir á almennum rættarligum grundarlagi, men á privatrættarligum grundarlagi,
4) málið longu er avgjørt í rættarmáli ella er av slíkum slagi, at nevndin heldur tað betur hóskar seg at gera av í einum rættarmáli,
5) nevndin á fyriliggjandi grundarlagi ikki metir, at ein nevndarviðgerð fer at geva eitt úrslit, sum stendur í mun til orkuna, nevndin skal seta av, fyri at kanna málið.
6) málið snýr seg um, at ein útreiðsla er hildin, sum ikki lógaheimild er fyri. Kærur um slík mál verða send løgtingsgrannskoðarunum til víðari viðgerð.
*Stk. 2.* Nevndin kann velja at vísa mál, sum hava við viðurskiftini hjá tí einstaka borgaranum at gera, til Løgtingsins umboðsmann.
*Stk. 3.* Skrivarin ger nevndini tilmæli sambært stk. 1 og 2.

**§ 6.** Um nevndin tekur mál upp til viðgerðar, sendir skrivarin landsstýrinum málið til ummælis við eini av nevndini ásettari svarfrest. Metir skrivarin, tá ið málið kemur aftur, at upplýsingar resta í, sendir hann málið til endurummælis við serligum atliti til tað, sum írestar.
*Stk. 2.* Tá nøktandi kæruummæli fyriliggur, verður tað sent møguligum kærara til viðmerkingar, um kærari er partur í málinum. Møguligar viðmerkingar frá kæraranum verða sendar landsstýrinum til viðmerkingar, og møguligar viðmerkingar frá landsstýrinum verða sendar kæraranum til viðmerkingar o.s.fr.

**§ 7.** Tá ið ummæli fyriliggur, kann landsstýrismálanevndin heita á skrivaran um at gera eitt upprit, sum inniheldur
1) eina frágreiðing um tær faktisku umstøðurnar í málinum,
2) eina frágreiðing um lóggávuna á økinum, og
3) ein samanburð millum lóggávuna og faktisku umstøðurnar

24. FEB. 2010



Løgtingið j. nr. 7.13-20100003

4) skrivarans fyribilsniðurstøðu í spurninginum um, hvørt skrivarin heldur, at løgmaður ella landsstýrismaður hevur framt brot á almenna rættarliga lóggávu.

*Stk. 2.* Skrivarin kann ístaðin siga frá, at hann enn heldur, at rímilig grund er at halda, at lógabrot er framt av løgmanni ella landsstýrismanni, men at hann heldur tað vera eina ov umfatandi uppgávu hjá skrivaranum at gera nevndini upprit í málinum, smb. stk. 1, at hann mælir landsstýrimálanevndini til at krevja av løgtingsformanninum, at settur verður ein kanningarstjóri sbr. stýrisskipanarlógini § 38. Saman við hesum tilmæli leggur skrivarin fyri nevndina uppskot til arbeiðssetning fyri kanningarstjóran.

*Stk. 3.* Heldur nevndin, at málið kann viðgerðast uttan upprit frá skrivaranum, verður málið tikið upp á fundi, tá ummæli fyriliggur.

**§ 8.** Tá ið landsstýrismálanevndin fær fyrilagt málið, tekur hon fyrst støðu til, um hon heldur, at málið er nóg væl upplýst, ella um skrivarin skal fáa tilvega fleiri upplýsingar.

*Stk. 2.* Nevndin kann eisini gera av, at hon fer at nýta heimild sína í stýrisskipanarlógini, § 38, at krevja, at settur verður ein kanningarstjóri at lýsa málið nærri.

*Stk. 3.* Heldur nevndin, at málið er nóg væl upplýst, tekur nevndin støðu til spurningin um løgmaður ella landsstýrismaður hevur framt brot á almenna rættarliga lóggávu.

**§ 9.** Um so er, at nevndin tekur ta støðu, at løgmaður ella landsstýrismaður ikki hevur borið seg ólógliga at, verður hetta fráboðað møguligum kærara umframt løgmanni ella landsstýrismanninum og málsviðgerðin er við hesum endað í nevndini. Metir nevndin, at málið hevur serligan politiskan áhuga, verður fráboðan eisini send øllum løgtingsmonnum.

**§ 10.** Er fyribilsniðurstøða nevndarinnar, at løgmaður ella landsstýrismaður hevur borið seg ólógliga at, so verður viðkomandi biðin um viðmerkingar til fyribilsniðurstøðu nevndarinnar og til grundgevingarnar fyri hesi fyribilsniðurstøðu.

**§ 11.** Tá í nevndin hevur fingið tær viðmerkingar sum nevndar eru í § 10, ger hon sína endaligu niðurstøðu av, hvørt hon heldur, at óregluliga hevur verið atborið.

**§ 12.** Kemur landsstýrismálanevndin til ta niðurstøðu, at løgmaður ella landsstýrismaður hevur borið seg ólógliga at, verður hetta saman við grundgeving nevndarinnar skrivliga fráboðað kæraranum, løgmanni viðkomandi landsstýrismanni og øllum løgtingsmonnum

**§ 13.** Starvsskipanin fær gildi beinanvegin.

*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi starvsskipan nevndarinnar samtykt 21. september 2000.

Soleiðis samtykt á landsstýrismálanevndarfundi 22. feburar 2010

Jaspur Vang
formaður

Kristina Samuelsen, skrivari